

Eldar Sætre, stjóri í Statoil, hevur 897 færri starvsfólk enn fyri einum ári síðani. Mynd: Jógvan H. Gardar

# 897 færri starvast hjá Statoil

**Jógvan Hugo Gardar**

22.03.2015 - 03:23

Oljan.fo

Talið á starvsfólkum hjá Statoil var 31. desember 2014 22.516. Hetta eru starvsfólk sum fyritøkan hevur um allan heim. Hetta eru 897 færri enn sama dag árið fyri. Tá vóru 23.413 í starvi hjá norska oljufelagnum, skrivar Sysla.

Statoil hevur boða frá at talið á starvsfólkum kemur at minka komandi tíðina, og gongdin farna árið er í tráð við tað sum er boða frá.

Tey flestu sum eru givin hjá Statoil, arbeiddu í Noregi.